# Valskúlin – ein sólskinssøga um 10. flokkarnar í Norðoyggjum

**Klaksvíkar Skúli hevur valt at skipa allar sínar 10. flokkar í ein felags skúladepil fyri Norðoyggjar, nevndur »Valskúlin« – ein higartil sera væl eydnað skipan, sum gevur íblástur til aðrar framhaldsskúlar kring landið**

10. FLOKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*





*Myndirnar sýna, hvussu fjølbroytta undirvísing næmingarnir í 10. flokki í Klaksvík fáa*
*Myndir: Eyðbjørn Jacobsen*

Fyri stuttum var býráðsumsitingin á stuttari kunningarvitjan í báðum teimum stóru skúlunum í Klaksvíkar kommu, sum eru Skúlin við Ósánna og Skúlin á Ziskatrøð.

Undir leiðslu av skúlastjórunum báðum, Símin Petur Hjelm og Signar á Brúnni, samstarva hesir báðir skúlar innan fleiri tættir.

Eitt av samstarvsøkjum skúlanna er innan 10. flokkarnar, sum eru lagdir saman í ein felags skúladepil fyri allar Norðoyggjar, nevndur »Valskúlin«, ið fevnir um íalt 63 næmingar.

Tað var ein ikki sørt errin Signar á Brúnni, skúlastjóri, ið vísti borgarstjóranum og umsiting hansara runt í hugnaligu hølunum hjá Valskúlanum, og tað var ikki uttan orsøk, tí Valskúlin er, sum skilst, ein higartil sera væl eydnað skipan fyri allar 10. flokkar í Norðoyggjum.

Tey halda støddina vera júst ta røttu, tí við hesum næmingatalinum hava tey eitt nøktandi grundarlag til at kunna bjóða nógvar ymiskar vallærugreinir, og samstundis er Valskúlin ikki so stórur, at tað gongur út yvir tað hugnaliga og heimliga umhvørvið.

Við tilvísing til skúlastjóran samskipar, Hanus T. Bærentsen, sum er royndur lærari, undirvísingina í Valskúlanum, har hann sjálvur er flokslærari hjá einum av flokkunum, samstundis sum hann samstarvar sera tætt við hinar flokslærararnar, sum eru Simona Johannesen, Tummas Joensen og Høgni á Reynatrøð.

Samstarvið millum hesar 10. flokkarnar er rættiliga tætt. Eitt nú fylgjast teir í sambandi við allar felags lærugreinarnar, soleiðis at lærarar og næmingar støðugt kunnu samstarva og stuðla hvørjum øðrum í frálæruni og menningini, eins væl og teir kunnu avloysa hvønn annan.

Royndirnar av at hava undirvísing í sergreinum, sum strekkja seg ígjøgnum alt skúlaárið, eru ikki bara góðar, tí tað vísir seg at vera torført at varðveita áhuga næminganna ígjøgnum alt árið, halda tey.

Men her hevur Valskúlin brotið upp úr nýggjum við heldur at leggja øðrvísi frálæru í tíðarskeiðum, har heilar vikur ístaðin verða lagdar av til serlig tiltøk, so sum fyrstuhjálparskeið, trygdarskeið, høvuðsverk innan ymiskar lærugreinar o.s.fr.

Eitt nú fer Valskúlin í november at geva næmingum møguleika at velja seg at arbeiða við einum evni í eina viku. Millum evnini eru list, og í tí sambandi fær skúlin eini fýra kend listafólk at undirvísa, og fara hesi at samstarva við næmingarnar og leggja teimum lag á. Arbeitt veðrur við horni, seyming o.a., og tá ið ið vikan er liðug, verður alt arbeiðið sýnt fram.

Royndir Valskúlans hava higartil boðað frá góðum. Hesin frálæruháttur tykist rigga sera væl.

Valskúlin leggur stóran dent á, at allir partar verða mettir, viðfarnir og ábyrgdaðir sum vaksin fólk. Barnaskúlatíðin er farin afturum – nú skulu næmingarnir royna seg í einum vaksnum umhvørvi, sum á mangan hátt minnir nógv um ein miðnámsskúla.

Eisini nakrar av lærugreinunum, sum kunnu veljast, og nakrar av høvuðsuppgávunum, sum næmingarnir fáa í hesum skúlaárinum, eru á miðnámsskúlastøði, og samstarv við miðnámsskúlar er eisini partur av tilboðum Valskúlans.





